

## Agger vil ikki rýma úr Liverpool

Daniel Agger hevur gjørt nýggjan fýra ára sáttmála við Liverpool, og hóast stórfeløg í Spania og Italia vildu hava danska verjuspælaran, valdi hann at halda fram í Liverpool. – Tað hevði verið eitt mistak av mær, um eg rýmdi úr Liverpool. Vit byggja nakað stórt upp, og eg vil gjarna vera partur av tí, sigur Daniel Agger.

## Djemba-Djemba vil víðari

Fyrrverandi Manchester United spælarin Eric Djemba-Djemba hevur seinasta árið spælt fyri OB í Danmark. Har hevur tað gingið væl hjá Djemba-Djemba, og nú er spælarin til reiðar at flyta til eitt størri land at spæla. – Eg veit um áhuga frá fleiri feløgum, og um eitt felag frá einari sterkari europeiskari kapping kann semjast við OB, so eri eg til reiðar at skifta fyri at vísa mínar dygdir, sigur Djemba-Djemba.

# Fyrsti triðingurin skjótt avgreiddur

**Fýra dystir í níggjunda umfari verða spældir sunnudagin og tann fimti mánadagin. Tá teir eru av, er fyrsti triðingurin av kappingini í Vodafonedeildini avgreiddur**

FÓTBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast mong munnu halda, at tíðin er flogin avstað, nú fyrsti triðingurin av landskappingini skjótt er lagdur aftur um bak, so er enn nógv eftir at spæla um. Undan dystunum í níggjunda umfari er framvegis høvi hjá øllum at fáa fullan posa, um væl hepnast í restini av kappingini, tí spælast skulu 19 dystir aftrat – og teoretiski møguleikin hjá øllum er at fáa 57 stig aftrat!

Tá teir fýra dystirnir sunnudagin og tann eini mánadagin eru spældir, fara fleiri óivað at gera upp, hvussu hilnast hevur, tí tá hava øll spælt eina ferð ímóti øllum. Og hóast nógv kann henda, so gevur fyrsti triðingur av kappingini ofta eina rættiliga góða ábending á, hvussu tað fer at síggja út, tá alt er liðugt í heyst.

### HB-KÍ

Hóast talan er um gamla klassikaran í Gundadali sunnudagin millum HB og KÍ, eru fortreytirnar undan dystinum sera ymiskar. HB er oddalið og KÍ botnlið, men hjá báðum ræður um at fáa stig. Eingin ivi er um, at her er HB stórfavorittur, og megnar KÍ at fáa enn ein javnleik, er tað mestsum at rokna fyri eitt bragd.

### EB/Streymur-ÍF

Ikki hevur tað lagað seg hjá greipuvinnarunum, sum sunnudagin taka ímóti ÍF við Margáir. EB/Streymur er sjey stig frá toppinum, men hevur her dyst ímóti einum svongum ÍF-liði, sum tvær ferðir upp í slag hevur tapt heima. EB/Streymur er favorittur, men heldur ikki meira enn tað, tí ÍF kann bíta frá sær.

### NSÍ-AB

Talan hevur verið um eina sera góða byrjan hjá runavíkingum, men tað hevur ikki verið á heimavølli, at eydnan hevur verið við. Liðið hevur vunnið allar útidystirnar, men bert vunnið ein heimadyst. NSÍ man tó fara at leggja meira fyri, nú AB sunnudagin kemur á vitjan sum eitt slag av »underdog«, ið tó ikki skal forsmáast.

### B68-07 Vestur

Toftamenn hava í síðstu dystunum víst styrki, og nógv bendir á, at B68 er við at fóta sær aftur í bestu mansdeildini. Ikki minst var sigurin á B36 sannførandi, so tí er B68 greiður favorittur, nú 07 Vestur, sum liggur niðan fyri niðurflytingarstrikuna, vitjar. Heima eru vágamenn betri enn á útivølli, so tí er B68 greiður favorittur sunnudagin.

### Víkingur-B36

Hóast dysturin millum Víking og B36 ikki er fyrr enn mánakvøldið, er lítið at ivast í, at bæði lið fara at fylgja sera væl við, hvat hendir í hinum dystunum. Víkingur sær út til at vera komið í gongd, meðan B36 er steðgað upp, so tí talar alt fyri einum heimasigri mánakvøldið.



*HB og KÍ hava spælt mangan klassikara sínamillum, men hesa ferð eru fortreytirnar sera nógv øðrvísi, enn tær plagdu at vera, tí liðini eru í hvør sínum enda á stigatalvuni*

*Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

## Soleiðis plagar at ganga

| Dystur/ár | 2008 | | 2007 | | 2006 | | 2005 | | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 | 1999 | v-j-t | mál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HB-KÍ | 0-1 | - | 1-1 | 3-1 | 5-1 | - | 2-1 | - | 1-1 | 3-2 | 4-1 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 6-2-3 | 22-13 |
| EB/S-ÍF | 0-1 | 3-2 | - | - | - | - | 1-1 | 2-2 | 7-0 | - | - | - | - | - | 2-2-1 | 13-6 |
| NSÍ-AB | - | - | 2-1 | 2-1 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 2-0-0 | 4-1 |
| B68-07 Vestur **) | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-1 | - | 5-1 | 2-0 | - | 2-0-1 | 7-2 |
| Víkingur *)-B36 | 1-2 | - | 0-1 | 0-3 | 1-2 | - | 1-2 | - | 0-3 | 1-4 | 2-2 | 3-1 | 1-0 | 2-1 | 3-1-7 | 3-9 |

*) Fram til og við 2007 eru hagtølini hjá GÍ nýtt

**) Fram til og við 2008 eru hagtølini hjá FS Vágum nýtt

Á talvuni sæst, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin og mánadagin hava dystast í tilsvarandi uppgerðum síðstu 10 árini.

# FCK danskur steypavinnari

**AaB hevði heldur ikki eydnuna við sær hesa ferð, tí fyri sjeyndu ferð í 22 ár taptu norðurjútlendingarnir eina steypafinalu**

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað er ikki eydnan hjá norðurjútska stórfelagnum, AaB, at koma í donsku steypafinaluna. Síðani 1987 hevur AaB verið í sjey steypafinalum, og hevur liðið tapt allar sjey finalurnar. Søguliga hevur liðið verið í 12 donskum steypafinalum, og bert tvær eru vunnar. Seinast AaB vann donsku steypakappingina, var afturi í 1970, tá teir vunnu 2-1 á Lyngby í finaluni.

### Verjumistak

Tað kom bert eitt mál í steypafinaluni millum FC Keypmannahavn og AaB, sum var spældur í Parkini í gjár. Tað málið fall til FC Keypmannahavn, sum sostatt á fjórða sinni kann rópa seg danskan steypavinnara.

AaB tapti steypafinaluna orsaka av einum verjumistaki hjá Andreas Johanson, tá hálvur tími var farin av dystinum. Hann misti bóltin uttan fyri egnan brotsteig til Zdenek Pospech, sum gjørdi skjótt av. Hann fann uttan trupuleikar William Kvist, sum skjeyt eitt gott skot, ið sat innanfyri nærmastu stong til 1-0, og tann leiðslan helt sær til dystarenda.

Andreas Johanson var sera vónbrotin aftaná dystin: – Vanliga geri eg ikki slík mistøk, tað átti eg at verið ov rutineraður til, og eri eg sera vónbrotin. Vit megnaðu tíverri ikki at gera skaðan góðan aftur í hinum endanum av vøllinum, segði hann.

### AaB stríddist

AaB stríddist væl í dystinum, og liðið vísti ein góðan vilja, men kom ikki til nógvar málmøguleikar. Jamaikanski áleyparin, Luton Shelton hevði ein stóran málmøguleika í fyrra hálvleiki. Tað eydnaðist at lobba bóltin upp um FCK-málverjan, Jesper Christiansen, men ólukkutíð fyri AaB, so fór bólturin eisini upp um málið. Annars spældi AaB seg ikki til nógvar opnar málmøguleikar.

Nú má AaB vóna, at FCK gerst danskur meistari, tí tað er einasti háttur, at felagið kann sleppa við í Europa League, sum er nýggja kappingin, ið kemur ístaðin fyri UEFA Cup. Gerst FCK meistari, so sleppur AaB í Europa League, sum steypavinnari.

AaB hevði annars eina sera góða Champions League og UEFA Cup kapping í hesum kappingarárinum, har teir spældu seg í 1/8 finalina í UEFA Cup kappingini.